# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



28. oktobur fingu hesi fittu børn, Jákup og Eva Døgg eina systir, hon eitur Hanna Bjørk. Her er hon 12 tímar gomul.



Hesin stolti stóribeiggin, sum eitur Thomas, fekk 8. okt. 2006 ein lítlabeiggja, sum kallast Simon. Foreldrini eita Eyðdis og Allan Helleskov, tey búgva í Danmark



Leygardagin 11. nov. 2006 fingu Randi og Símun Jóannesarson Hansen, Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 3930g og var 53 cm langur.



Leygardagin tann 11. november fingu Joan Jacobsen og Peter Mouritsen, Frederiksberg, eina dóttur. Hon var 48cm long og vigaði 2690 gr.



15. novembur fingu Annie og Dánjal eina lítlasystir, hon eitur Sólja. Hon vigaði 3600 gr og var 52 cm long. Foreldrini eru Eydna D. og John V. Petersen, Norðragøta.

28. juni fingu JanaMari Olsen og Ragnar Hansen, Vágur, tvíburar - dreingir. Tann eini var 35 cm. langur og vigaði 680 gr. og hin var 37 cm. langur og vigaði 740 gr.

9. november fingu Annie og John Henrik Holm, Vágur, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4370 gr.

15. november fingu Anne og Ragnvaldur Davidsen, Ålsgårde, Danmark, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2870 gr.

16. november fingu Barbara Nolsøe og Karl Øster, Tvøroyri, búsitandi í Keypmannahavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3914 gr.

16. november fingu Sólrun og Egin Fríði Ørvarodd, Viðareiði, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3725 gr.

17. november fingu Óluva Samuelsen og Virgar Fagraklett, Kollafjørður, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3800 gr.

19. november fingu Linda Jensen og Allan við Rætt, Toftir, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4350 gr.

19. november fingu Andrea Mouritsen og Heri Reynheim, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4200 gr.

21. november fingu Anja Haraldsen og John Gudmundsen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3080 gr.

22. november fingu Berit Joensen og Poul Leon Danielsen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4250 gr.

# Hergerð Hansen í Vági 70 ár

Í dag, 24. novembur, verður Hergerð Hansen í Vági 70 ár.

Hóast hon ikki er nakar ársungi, so má sigast, at hon ber sín aldur væl.

Hergerð er elst av børnunum hjá Alfridu og Palla í Tøðuni í Vági.

Tá ið realskúlin var farin afturum, gekk hon eitt skifti við posti.

22. februar 1958 giftist hon við Ellingsgaard Hansen úr Sørvági, og tey búsettust á Brekkubø. Børnini fingu tey 4: Palla, Jakobinu, Allu og Jákup.

Meðan børnini vóru smá, var Hergerð heima. So stóð hon í handli í nøkur ár.

Síðan royndi hon seg m.a. sum heimahjálp og dagrøktarmomma.

Hesi seinru árini hevur hon bundið mangt eitt plaggið!

Tá ið okur vóru óvitar, var ein kona, sum náddi dustsins aldur, ein gomul kona! Myrku klæðini og turriklæðið á høvdinum gjørdu sítt, men liviháttur og verumáti... alt bar brá av ellisárum.

Soleiðis er ikki longur. Og takk og prís fyri tað! Hví skulu fólk gevast



at liva – um lív og heilsa annars eru hampilig - bara tí, at dópsattestin sigur sjeyti?

Hjá Hergerð og Ellingsgaard var eitt slag av tilhaldi, tá ið tiltøk av ymiskum slagi vóru í Vági. Mangir eru teir tónleikarar - frá Kristiani Blak til Holger Lauman - sum hava sitið væl á Brekkubø!

Og hvør minnist ikki reyðu tjaldleguna við Ryskivatn, tá boð komu sunnumorgun eftir kokki at gera sós.

Sangur og tónleikur hava altíð havt sín týðandi leiklut í heiminum hjá teimum. Tað er ikki av ongum, at Palli og Jakobina hava gjørt vart við seg á føroyska tónleikapallinum.

Ellingsgaard, sum var heilsuveikur tey seinnu árini, andaðist á sumri 2000.

Føðingardagsbarnið dugir – við sínum unga sinni – at taka sær av løttum, tá ið høvi býðst. Og tað kemur meira enn so fyri, at munnharputónarnir berast um Brekkubø, tá ið trivið verður í onkran av teimum góðu, gomlu sjelarunum.

Eg og míni fara at ynskja Hergerð, stórusystir, hjartaliga til lukku við føðingardegnum, nú hon fer um tey sjeyti, sum ein av yngstu pensionistunum í landinum!

**Lítli beiggi**

# Erling Poulsen deyður

Mikudagin 22. november andaðist Erling Poulsen, ættaður úr Vági, búsitandi í Havn, á Suðuroyar sjúkrahúsi, 82 ár gamal.

Erling var vágbingur og útbúgvin lærari. Hann var lærari í Vági í 36 ár, frá 1952 til 1988. Hann var eisini deknur í Vágs kirkju frá 1967 til 1978. Tá Føroya Lívstrygging varð stovnað í 1967, varð Erling ein av fyrstu umboðunum í Suðuroy. Tá hann gavst sum lærari í Vági, flutti familjan til Havnar at búgva.

Annars er hann best kendur fyri síni mentanarligu avrik. Hann hevur bæði týtt og skrivað fleiri bøkur. Nakað av tí hann hevur týtt hevur eisini verið lisið upp í útvarpinum.

Í 1995 gav bókadeildin hjá Føroya Lærarfelag út bókina “Mangt er millum himmal og jørð”, sum Erling skrivaði saman við Torkil Beder í Fuglafirði, sum eisini er vágbingur.



Erling hevur m.a. eisini givið út bøkurnar “Vikarbyrgi” (1990), “Laura, Immanuel og Aldan ganga burtur” (1992), “Smyrlarnir í strandfarasigling” (1995), “Tjaldrið” (1997), “Lopra – niðursetubygd og hvalastøð” (1998), “Marité” (2000), “Bjargingarroynd I” (2001), “Bjargingarroynd II” (2001) og “Loranstøðin við Eggjarnar” (2004).

Seinnu árini arbeiddi Erling á Fornminnissavninum sum vaktarmaður.

Foreldrini hjá Erling vóru Josefina, f. Thomassen, úr Vági, og Mortan Poulsen, ættaður úr Víkarbyrgi. Erling giftist við Lydiu Langgaard úr Leirvík, tey fingu børnini Bjørghild, sum býr á Argjum, og Mortan, sum býr í Hoyvík. Lydia andaðist 10. juni í 2002.

## Dagurin

**25. november. Katrin**, deyð umleið ár 300. Halgisøgurnar greiða frá eini vakrari og klókari prinsessu í Aleksandriu, sum mangir hábornir menn bóðu um, líka keisarin. Men hon vildi ongum játtast, tí at Kristus var hennara sanni brúðgómur. Hon viðgekk alment kristnu trúgv sína og varð tikin av døgum. Hon varð jarðað á Sinaifjalli, har eitt katrinarkleystur er bygt yvir grøv hennara. Navnið er grikst og merkir hin reina, hin óspilta

**26. november. Konrad**, deyður ár 975. Týskur fúrstasonur, sum seinni bæði gjørdist dómpróstur og biskupur. Hann læt byggja bæði kirkjur og sjúkrahús og kleystur. Varð skýrdur halgimenni í 1123. Konrad er týskt navn og kemur upprunaliga av einum orði, sum merkir hin ráðatøkni.

**27. november. Facundus**. Var úr Leon í Spaniu, deyður umleið ár 300. Hann og ein bróðir hansara vórðu tiknir av døgum við ánna Ceia í Calisiu í Norðurspaniu.